ALMANNA– OG MENTAMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF SOCIAL AFFAIRS AND CULTURE

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3Postboks 208
110 Tórshavn

29. apríl 2024
J.nr**:** 24/10725-1
Viðgjørt: Heri Petersen

Løgtingsmál 112/2023 – yvirlit yvir veitingar o.a. til stakar uppihaldarar
Almanna- og mentamálaráðið sendir við hesum yvirlit yvir veitingar, ið stakir uppihaldarar hava rætt til. Nakrar av veitingunum eru treytaðar av inntøku, og tí er niðanfyri eisini sett nøkur dømi um stakar uppihaldarar við ymsum inntøkum.

Veitingar o.a., ið hoyrir til málsræði hjá landsstýriskvinnuni í almanna- og mentamálum

- *Familjuískoyti (sbrt. løgtingslóg um familjuískoyti)*
  Um inntøkan er lægri enn 290.000 kr., og tann staki ikki hevur ogn hægri enn 30.000, hevur viðkomandi rætt til familjuískoyti. Familjuískoyti kann vera upp til 4.000 kr. um mánaðin, um mann hevur eitt barn. Upphæddin hækkar við 500 kr. fyri hvørt barnið aftrat tí fyrsta.

- *Barnagjald til einsamallar uppihaldarar (sbrt. løgtingslóg um barnagjald til einsamallar uppihaldarar)*
  Barnagjald er eitt gjald frá einum foreldri til hitt, og sostatt er talan ikki um stuðul frá tí almenna. Ein stakur uppihaldari, hevur rætt til barnagjald uttan mun til, um tann gjaldsskyldugi er førur fyri at rinda ella ikki. Eisini í teimum førum, at faðirskapurin ikki er staðfestur, hevur tann einsamalli uppihaldarin rætt til barnagjald. Tað er vanligt, at Almannaverkið leggur út og krevur peningin inn frá tí gjaldsskylduga.

  Barnagjald er 1.162 kr. um mánaðin fyri hvørt barni.

- *Serligt barnaískoyti til einsamallar uppihaldarar (sbrt. kapittul 3 í løgtingslóg um barnagjald til einsamallar uppihaldarar)*
  Treytin fyri at fáa serligt barnaískoyti er, at mann er *reelt* stakur. Ein stakur uppihaldari, ið t.d. býr inni hjá egnum foreldrum, fær eisini veitingina. Veitingin er óheft av inntøku og ogn.

  Upphæddin er 893 kr. fyri hvørt barni um mánaðin, ið verður útgoldin hvønn ársfjórðing (2.679 kr. hvønn ársfjórðing).

- *Fíggjarligt fríplass á dagstovnum (sbrt. kunngerð um fíggjarligt fríplass)*
  Stakur uppihaldari, ið hevur ársinntøku lægri enn 304.500 kr. rindar onki egingjald til dagstovn (og frítíðarskúla). Tá inntøkan fer upp um hesa upphæddina, hækkar egingjaldið stigvíst, inntil inntøkan røkkur umleið 380.000 kr., tá fult gjald verður rindað.

- *Fyribils uppihaldsveiting vegna barnsburð (sbrt. § 11 og 12 í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur*
  Kvinna, ið gerst við barn, og sum ikki hevur nakað inntøkugrundarlag av týdningi, og sum ikki hevur innistandandi meira enn 30.000 kr., hevur vanliga rætt til fyribils uppihaldsveiting. Kvinna, sum t.d. fær heilt lága veiting frá Barsilsskipanini, kann fáa ískoyti frá Almannaverkinum Veitingartíðarskeiðið er tað sama sum í løgtingslóg um barsilsskipan.

  Kvinna, ið býr einsamøll, fær 17.907 kr. um mánaðin.
  Kvinna, ið býr saman við øðrum vaksnum persóni, fær 13.928 kr. um mánaðin (upphæddirnar eru skattskyldugar).

- *Barnaviðbót (sbrt. almannapensjónslógini)*
  Fyritíðarpensjónistur (og fólkapensjónistur), sum hevur uppihaldsskyldu mótvegis barni, hevur umframt pensjónina, eisini rætt til barnaviðbót. Barnaviðbót er 1.162 kr. fyri hvørt barni.

- *Fíggjarligt ískoyti til keyp av barnaútgerð (sbrt. § 19 í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur)*
  Í ávísum førum kann stuðul veitast til keyp av barnaútgerð til nýføðingar. Stuðulin verður veittur við støði í eini ítøkiligari tørvsmeting. Foreldur, sum eru í eini støðu, har tað verður mett, at tey ikki hava møguleika at útvega útgerð, uttan at fíggjarliga støðan verður sett í vanda, kunnu fáa fíggjarligt ískoyti ymsa útgerð.

Veitingar og stuðul, ið hoyrir til málsræði hjá øðrum landsstýrisfólkum

- *Lestrarstuðul frá Studna (sbrt. løgtingslóg um lestrarstuðul)*
  Stakur uppihaldari, ið er lesandi, hevur umframt vanligan studning, eisini rætt til tvær upphæddir frá Studna:
  1. Einsamallur uppihaldarar fáa 1.762 kr. um mánaðin (ikki pr. barn)
  2. Barnastudningur upp á 1.150 kr. um mánaðin fyri hvørt barni.

  Lesandi í barsilsfarloyvi hava rætt til lestrarstuðul í farloyvistíðarskeiðnum. Umframt lestrarstuðulin kann tann lesandi fáa ískoyti frá Almannaverkinum.

- *Barnafrádráttur í skattinum*
  Allar barnafamiljur hava rætt til ein frádrátt í skattinum fyri hvørt barni. Fyri barn yngri enn 7 ár er frádrátturin í miðal 1.436 kr. um mánaðin. Fyri barn 7 ár ella eldri er frádrátturin í miðal 1.211 um mánaðin.

  Um persónurin, ið hevur rætt til barnafrádrátt, ikki hevur skattskylduga inntøku (t.d. ein lesandi), verður frádrátturin fyri alt árið útgoldin eina ferð.

Dømi um inntøkur hjá støkum uppihaldarum

Niðanfyri eru dømi um inntøkur hjá støkum uppihaldarum. Dømini vísa inntøku, tá skattur og øll tvungin gjøld eru drigin frá (arbeiðsmarknaðargjøld, heilstutrygdargjald og kringvarpsgjald). Dømini taka støði í miðal kommunuskattaprosentið. Í dømunum við einum barni er aldurin á barninum 5 ár. Í dømunum við tveimum børnum er aldurin ávikavist 5 og 8 ár.

Í dømunum er allur barnastuðul íroknaður. Støði er tikið í, at persónurin ikki hevur innistandandi pening á meira enn 30.000 kr., og tað merkir, at viðkomandi hevur rætt til familjuískoyti.

Serligt barnaískoyti verður útgoldið hvønn ársfjórðing, og barnafrádráttur til lesandi verður útgoldin eina ferð um árið. Hetta er í dømunum niðanfyri umroknað til mánaðarligar upphæddir.

Inntøkur aftan á skatt hjá støkum uppihaldarum – íroknað allur barnastuðul

	Inntøka aftan á skatt um mdr.
Løntakari uttan børn (Føroya arbeiðarafelag)	15.100
Løntakari, støk, 2 børn (Føroya arbeiðarafelag)	22.928
Lesandi hægri lestur, 1 barn	15.360
Lesandi hægri lestur, 2 børn	20.279
Fyribils uppihaldshjálp, 1 barn	17.571
Fyribils uppihaldshjálp, 2 børn	21.338
Hægsta fyritíðarpensjón, 1 barn	23.354
Løntakari, stakur 1 barn	
Inntøka 15.000 kr. mdr.	16.244
Inntøka 20.000 kr. mdr.	17.978
Inntøka 25.000 kr. mdr.	19.262
Løntakari, stakur 2 børn	
Inntøka 15.000 kr. mdr.	20.010
Inntøka 20.000 kr. mdr.	21.745
Inntøka 25.000 kr. mdr.	22.529

Almanna- og mentamálaráðið

Heri Petersen
fulltrúi